# Skótadepilin fær betri um

**SELATRAÐ** – Eftir egnum ynski eru vit fyribils sloppin inn í tað, tey rópa pumpuhúsið. Bygningurin líkist einum neysti. Her fara vit at hava okkara bátar, motorar, tangar, flakar, bjargingarvestar, vátdraktir og fiskireiðskap – ella alt, sum hoyrir hesum partinum av aktivitetunum til. Tað er ein veldugur lætti at sleppa undan at draga alla hesa útgerð oman og niðan, sigur Magni Laksáfoss, skótaovasti hjá KFUM-skótunum í Føroyum





SKÓTAR

*– Hetta er ein veldugur lætti, umframt alt tað pláss, sum nú verður eftir við depilin, sigur Magni Laksáfoss, skótaovasti hjá KFUM-skótunum í Føroyum, sum her situr fremstur á myndini*

*Mynd: Birgir W. Høgnesen*

Vilmund Jacobsen

Fyri góðari viku síðan slapp Skótadepilin á Selatrað inn í sonevnda pumpuhúsið á gomlu smoltstøðini hjá Bakkafrosti á Selatrað.

Stóra ali- og framleiðslufelagið á Glyvrum hevur fyribils gjørt av at lata Skótadepilin brúka og innrætta seg í tveimum av bygningunum á smoltstøðini í bygdini, sum hevur verið óvirkin seinastu árini.

Stjórin í Bakkafrosti, Regin Jacobsen, segði við Sosialin mánadagin, at nú fáa partarnir at síggja, hvat kann spyrjast burtur úr, at Skótadepilin í fyrsta lagi sleppur inn í tveir av hesum bygningum hjá felagnum.

– Vit halda, at skótarnir gera eitt ógvuliga gott og sjálvboðið arbeiði, og hetta vilja vit virðismeta við at lata tey sleppa inn á smoltstøðina at innrætta seg við nøkrum av sínum aktivitetum, segði Regin Jacobsen.

## Stór hjálp

Magni Laksáfoss, sum er skótaovasti hjá KFUM-skótunum í Føroyum, fegnast stórliga um stórsinni hjá Bakkafrosti at lata Skótadeplinum hesar bygningar til nýtslu.

Hann sigur, at tað er líka nógv Regin Jacobsen sjálvur, sum tey, ið standa aftanfyri depilin, sum vístu á henda møguleika.

– Eftir egnum ynski eru vit fyribils sloppin inn í tað, tey rópa pumpuhúsið, har smoltstøðin hevði sítt reinsiverk. Bygningurin líkist einum neysti. Her stóðu stórar trumlur, sum eru tiknar út. Hesin bygningur man vera um hundrað fermetrar stórur, og her fara vit at hava okkara bátar, motorar, tangar, flakar, bjargingarvestar, vátdraktir og fiskireiðskap – ella alt, sum hoyrir hesum partinum av aktivitetunum til.

Magni sigur, at Skótadepilin eigur fýra 5-mannafør, 23 tunnuflakar og 150 bjargingarvestar.

– Nú eiga vit eisini fýra kanoir, 50 vátdraktir, fitjur og kavaraútgerð annars.

Hann vísir á, at tað er stórur munur á at skula fáa alla hesa útgerð einar 200-250 metrar oman og niðan aftur til depilin – og so at kunna brúka hetta húsið, sum liggur bert einar 20 metrar frá sandinum.

– Hetta er ein veldugur lætti, umframt alt tað pláss, sum nú verður eftir við depilin, leggur hann aftrat.

Magni sigur, at Skótadepilin hevur ikki kunnað havt 5-mannaførini standandi inni, og tað er ringt fyri bátarnar at standa úti um vetrarnar.

– Men allar hesar umstøður verða nógv betri, nú vit hava fingið hesa avtalu í lag við Bakkafrost, sigur hann.

> **» ... vit fara aftur í heyst at bjóða øllum føroyingum til Selatraðar at royna ymisku aktivitetirnar...**
>
> MAGNI LAKSÁFOSS

## Alment tiltak

Magni Laksáfoss, skótaovasti, sigur, at sjógvumhvørvið við Selatrað er sera væl egnað til aktivitetir sum hava við sjógvin at gera.

– Her er deyðavatn, einki rák, og lítil og eingin munur er á flóð og fjøru. Tað einasta, vit skulu ansa eftir, er lotið og serliga, tá tað liggur út av landi.

Hann vísir á, at Selatraður í aðrar mátar er ein sonn náttúruperla, sum liggur avsíðis og er sera væl egnað til ein slíkan depil.

– Stórur áhugi er at koma til Selatraðar, og longu nú kunnu vit siga, at allur mai, juni og juli mánaði eru bookaðir til eitt nú skúlar og barnagarðar, føroyingar og útlendingar.

Hann sigur, at Skótadepilin aftur í ár fer at bjóða øllum